**8. flokkur**
**Vágs skúli**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 4/2012: Uppskot til samtyktar um kantinur í fólkaskúlum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um kantinur og uppskot um játtan á fíggjarlógini, ið kann tryggja, at allir fólkaskúlar/fólkaskúla-eindir hava eina kantinu til næmingarnar, ið lýkur myndugleikanna ásettu krøv um slíkar kantinur.

**Viðmerkingar**
Landsins myndugleikar eru í ferð við at leggja skúlar saman í eindir. 8. flokkur í Vágs skúla metir, at tá næmingar eru á skúlunum allan dagin, er tað sjálvsagt, at kantina er á skúlanum til næmingar og lærarar. Hetta bøtur eisini nógv um reinførið og trivnaðin á skúlunum.

Eisini kann hugsast, at tá skúlaeindirnar eru lagdar saman, er fíggjarstøðan í økinum so vánalig, at økið sjálvt ikki megnar hesa uppgávuna. Sostatt verður mett, at hendan uppgávan verður best loyst við, at kantinan verður sett á stovn saman við skúla-eindunum.

8. flokkur í Vágs skúla heldur ikki, at tað kann vera rætt, at næmingar, sum eru á skúlanun allan dagin, skulu eta av sama borði, sum teir hava sitið og arbeitt við allan fyrrapartin av degnum.

**Á Løgtingið, 6. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Nancy Poulsen | Svanna Olsen | Ólavur Ludvig |
| Jákup Poulsen | Eyrið Mortansdóttur | Pætur Leo |
| Marita Thorteinsson | Gutti Kristiansen | Rani Johansen |